## Runavíkar kommuna søkir eftir

# pedagogum

## til Barnagarðin á Mýrunum

Á Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur við 14 børnum í hvørjari, 3 barnagarðsstovur við 18 børnum í hvørjari og ein barnagarðsstova við 12 børnum.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

Vit ynskja tí at umsøkjarin:

- hevur umsorgan fyri børnum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 5 pedagogum á 35/40 t. um vikuna.

Setan verður frá 15. august 2005 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara ella Conny Jacobsen, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. juni 2005, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

# Starvsfólk til Skilling

Vit sóknast eftir tveimum starvsfólkum.

Eitt fólk til deild okkara í miðbýnum 3/4 tíð at byrja 1. juli.
Eitt fólk til deild okkara í SMS 1/2 tíð at byrja 1. august.

Vinaliga støkk inn á gólvið við eini skrivligari umsókn.

SKILLING

Tel. í miðbýnum 312225 • tel. í SMS 315656

Sniðgev tín egna skógv



mi adidas

7. - 11. juni bílegg tíð

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · N. Finsensgøta 5
Postsmoga 268 · 110 Tórshavn · Tel 35 53 00

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3955**
**Navn:** Sp/f Bakkagrill
**Adressa:** 800 Tvøroyri
**Kommuna:** Froðbiar
**Stovningardato:** 13-05-2005
**Viðtøkudato:** 13-05-2005
**Stovnarar:**
David James Findleton, 800 Tvøroyri
**Stjórn:**
David James Findleton, 800 Tvøroyri, (stjóri)
**Grannskoðari:**
K-ReVisión v/Kristian Holbæk Kristensen, 800 Tvøroyri
**Partapeningur:** kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka grillkiosk og annað yrki í hesum sambandi.
**Roknskaparár:** 01.07 - 30.06
**Fyrsta roknskaparár:**
13.05.2005 - 30.06.2006

Skráseting Føroya
tann 01. juni 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2713,** Sp/f Handilsvirkið Poulsen, 100 Tórshavn.
**Fusión:** Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F-lógini:
**A. Navn**: Sp/f Handilsvirkið Poulsen (Sp/f-nr.2713), 100 Tórshavn
**B: Navn:** Sp/f Ognarfelagið Handan Á 1 (Sp/f-nr. 2712), 100 Tórshavn.
Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134c, stk. 4 í P/F-lógini.

Skráseting Føroya
tann 01. juni 2005

Kristin Balle

---

# Summarframsýningin 2005 í Listaskálanum

Summarframsýningin 2005 letur upp mentanarnáttina 3. juni kl. 21.00 til kl.23.00 í Listaskálanum.

Í ár luttaka listafólkini:
Amariel Norðoy, Asgerð (Aggi) Ásgeirsdóttir, Guðrið Poulsen, Hans Pauli Olsen, Jóna Rasmussen, Kári Svensson, Marius Olsen, Rannvá Mortensen, Súsanna í Jákupstovu, Vígdis Petersen og Zacharias Heinesen.

Í sambandi við upplatingina av framsýningini framføra tveir av dugnaligastu næmingunum á Tórshavnar Musikskúla Mattias Kapnas, klaver og hann spælir Prælludium og fuga i d-mol af J.S.Bach, Mattias vann 2. virðislón í Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence og Jón Festirstein, violin spælir Gavotte af J.S.Bach, Jón byrjar á Det Kgl. Danske Musikkonservatorium.

Opið er:
Týsdag til fríggjadag kl. 14.00 til 17.00
Leygardag og sunnudag kl. 14.00 til 18.00

**Listasavn Føroya**
TEL 313579 · WWW.ART.FO

Sosialurin 341800

# OUTSIDER MAGAZIN

OUTSIDER MAGAZIN ER ĒTKOMIħ!

ViÏ ² blaÏnum eru greinar, ummÞli, essays, nÏggjar fßroyskar sßgur v.m. BlaÏiÏ, sum er 176 s²Ïur, kann keypast ² b·khandlum og st·rum kioskum ² Fßroyum og kostar 165 kr.

OUTSIDER MAGAZIN kann eisini b²leggjast § nÏggju heimas²Ïuni www.outsidermagazin.com

Tey, sum vilja halda blaÏiÏ, kunnu senda mail til outsidermagazin@gmail.com ella br¼ka lepan niÏanfyri. Gjßrligt er eisini at seta 165 kr. (+ 35 kr. fyri postgjald) § konto 9181 1447957 ² Fßroya Sparikassa ð minnist til at viÏmerkja tygara b¼staÏ!




NAVN: ____________________
BĒSTAħUR: ____________________
POSTNR. & BĭUR/BYGD: ____________________
LAND: ____________________

Lepin skal sendast til:
OUTSIDER MAGAZIN - Haldarar
v/ Svend Hßjgaard Å Rektorparken 22, 4. tv Å DK - 2450 Kßbenhavn SV

Hßgni Egholm Magnussen - illigraphique.com

# Lesið Sosialin - so eru tit við